# Jørgin Niclasen 40 ár



Leygardagin 17. januar fylti Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, vinnulívsmaður og formaður Fólkafloksins, 40 ár.

Jørgen Niclasen er sørvingur, sonur Hervør, f. Jørgensen úr Miðvági, og Niclas Niclasen úr Sørvági.

Jørgen tók studentsprógv í Hoydølum í 1988. Hann var ungur, tá hann kom upp í politikk. Hann var varamaður á tingi fyri Fólkaflokkin nøkur tíðarskeið frá 1989 til 1993 og varð fyrstu ferð valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Vága valdømi í 1994.

Hann hevur havt nógv álitisstørv. Frá 1994-96 var hann formaður í Landsstýrismálanevndini, og frá 1996-98 var hann formaður í Vinnunevndini. Hetta tíðarskeiðið (1996-98) var hann limur í sendinevnd Løgtingsins í Norðurlandaráðnum. Hann hevur eisini verið Fíggjarnevndini og í paragraf 19 nevndini, sum kannaði 1980-ini. Frá 2004-2008 var hann formaður í Trivnaðarnevndini.

Hann var landsstýrismaður við fiskivinnumálum frá 1998-2003, og síðan september 2008 hevur hann verið uttanríkisráðharri.

Sum vinnulívsmaður hevur Jørgen eisini roynt seg á ymiskum økjum. Hann hevur verið stjóri í familjufyritøkuni Handilsvirkinum Niclasen í Sørvági, har hann eisini er partaeigari, í fleiri ár. Fyrst eitt skifti fyrst í 1990-unum, síðan var hann stjóri frá 1994-98 og frá 2003-2008. Hann var eisini í saltfiskavirkinum p/f Tomba frá 1994-1998 og nevndarlimur í Atlantic Airways frá 1990-91.

Jørgen er giftur Annelenu Vest, f. Joensen, úr Hvalvík, dóttir Ásvør og Julian.

Børnini eru: Linda (f. 1993), Ásvør (f. 1995) og Julian (f. 2001).

-red

## Andlát og jarðarferðir

**Elsabeth Bjarnason** fer til gravar úr Fossvogs-kapell í Reykjavík hósdagin 22. januar klokkan 13.

**Christen Joensen**, Klaksvík, vanliga nevndur Christen hjá bedingsmeistaranum, andaðist hósdagin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 74 ára gamal.

**Torleif Pugesgaard**, Vigersted í Danmark, andaðist á Roskilde sjúkrahúsi mikudagin, 60 ára gamal.

## Dagurin

**19. januar. Pontianus.** Úr Spoleto í Italia. Doyði umleið ár 160 fyri trúgv sína. Gamli Knútur hertogi er eftir julianska kalendaranum sami sum nevndur er 7. januar.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Henny Jensen**
úr Kvívík

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 17. januar, 86 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 19.00.
Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju mikudagin kl. 13.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

**Katrin, Marjun, Birita, Durita og Jóan Petur**

Tey, ið ynskja at senda eina heilsan, kunnu lata Kvívíkar kirkju eina gávu.


altíð við tí nýggjasta!



Tekna teg sum haldara nú fyri einans
495,- um ársfjórðingin
Sparið 560,- í mun til leysasølu!

Í dag er neyðugt hjá øllum at fylgja væl við í fjølmiðlunum, har vinnulív, politikkur, mentan, handil o.a. verður dagliga viðgjørt.

Ja takk! Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Send lepan til: Sosialurin, boks 76, FO-110 Tórshavn


## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Haldgrím Gregersen**
Syðrugøta

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Gøtu kirkju.
Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hallgerð, Maria, Kirstin, Randi og Jónvá v/ familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri bróðir og svágur

**Peter Jacob Vágsá**
(Piddi í Búðinum)

andaðist og varð jarðaður.
Ein serlig tøkk til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Heimarøktina, ið vóru um hann við hjálpsemi og umsorgan.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Vit ynskja tykkum øllum eitt gott nýggjár og Harrans signing.

*Fyri tey avvarðandi*
**Selma, Kristin og Simona**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá mín kæra kona og okkara kæra mamma, vermamma og omma

**Súsanna Dam**

doyði og varð jarðað.
Vit takka Hera Joensen presti fyri troystarrík orð, kirkjutænarum, sangarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Eina serstaka tøkk til Øss Berghamar fyri vitjanir og troystarrík orð í tíðini á Ríkissjúkrahúsinum.
Takk fyri heilsanir, kransar og blómur.
Takk fyri peningagávur til Føroya Felag móti Krabbameini.
Takk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jógvan, Jóhanna Elisabeth, Margreta, Torgerð og Bjørg**